# Lata okkum kúga av Sea Shepherd

**- Vit vinna einki við at lata okkum kúga og hyggja at, meðan Sea Shepherd rekur grindirnar út á hav aftur, so vit ikki fáa fatur í teimum, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri**

Vilmund Jacobsen

Tað er í húsinum Á Munkinum, at Sands kommuna hevur undirhús, alment wc, brúsu og ymiskar fasilitetir til oyggjafólk og vitjandi í Sandoynni annars.

Sambært skeltinum, sum nú hongur uppi, hava øll vitjandi framhaldandi atgongd til hølini og til teir fasilitetir, sum her eru, men ein bólkur av fólki er undantikin hesum møguleikum.

Tað eru limir í Sea Shepherd. Hesi eru IKKI vælkomin at brúka nevndu fasilitetir hjá Sands kommunu longur.

Sea Shepherd-fólkum verður nevniliga sýtt atgongd í hølunum.

Tað er borgarstjórin, Brandur Sandoy, sum leggur navn til nýggja skeltið, og hann sigur, at fólk hjá felagsskapinum bæði hava brúkt - men eisini misbrúkt - hølini, síðan tey komu higar til lands.

- Umframt at tey bæði hava brúkt og misbrúkt hølini, hava tey eisini stjolið wc-pappír og annað í húsinum, sigur hann.

Sjálvur heldur Brandur Sandoy, sum eisini er løgtingslimur í samgongu, at landsstýrið er ótrúliga passivt í málinum um Sea Shepherd, sum hann tekur til.

- Vit vinna einki við at lata okkum kúga og hyggja at, meðan Sea Shepherd rekur grindirnar út á hav aftur, so vit ikki fáa fatur í teimum.

Brandur Sandoy sigur, at hann ætlar at gera tað, hann er mentur, fyri at vísa løgtinginum á, at føroyingar í spurninginum um Sea Shepherd áttu at havt handlað øðrvísi, enn gjørt hevur verið higartil.




*- Fólk hjá Sea Shepherd eru IKKI vælkomin at brúka fasilitetir hjá Sands kommunu, sigur Brandur Sandoy, borgarstjóri*



# Trolbátar landa í vikuni

Vilmund Jacobsen

- Bara tvey partrolarapør fiska botnfisk í løtuni. Hini skipini fiska antin makrel ella liggja. Eitt par kemur inn at landa í dag.

Tað veit Fiskamarknaður Føroya at siga.

Um djúpvatnstrolararnar verður sagt, at teir, sum ikki liggja við bryggju, eru á makrelveiði.

- Fleiri trolbátar eru til fiskiskap, og vit vænta teir allar inn at landa síðst í hesi vikuni, sigur marknaðurin.



**Nei, Heðin Mortensen, borgarstjóri, er ikki í boksidysti,** *sum myndin kundi bent á. Hann luttók í rennikapping á ovastevnu fríggjadagin…*




**Ein partur av skránni fyri ovastevnu hevur í nógv ár verið kabarett -og í ár ber hon heitið "Grind Propp". Kabarettin sigst vera sera skemtilig...**

# Løgreglan arbeiðsleys í vikuskiftinum

**Fríggjakvøldið var regattasigling í Sundalagnum og regattadansur í Hósvík, og í Nólsoy varð ovastevna hildin, men sambært løgregluni hava fólk eftir øllum at døma skikkað sær væl**

Vilmund Jacobsen

- Hóast hesi tiltøk, sum savna fólk, hevur hetta verið eitt stak friðarligt vikuskifti hjá okkum.

Tað sigur vaktleiðarin á løgreglustøðini í Havn í morgun.

- Her hevur einki nevnivert verið á skránni. Eingin harðskapur, og ferðslan hevur eftir øllum at døma eisini gingið væl.

Tá Sosialurin hevði samband við vaktleiðaran í morgun, segði hann seg hava verið við á fundum, har eitt nú farna vikuskifti varð umrøtt.

- Men, eg haldi ikki, at her var nakað av almennum áhuga, og tískil kunnu vit bara ásanna, at hetta hevur verið eitt av teimum heilt friðarligu vikuskiftinum, segði vaktleiðarin.




*Einki nevnivert hevur verið á skránni hjá løgregluni um vikuskifti*